**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MIÐBÝARKJARNUNA**
SB_Tórshavn_Miðbýarkjarnan_2022_3_X

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 321, 322, 323 og 327, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaða- og miðstaðabygging.

Stk. 2. Økið liggur í 1. grundumráði, sum sambært almennu byggisamtyktini skal brúkast til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.

Stk. 3. Sambært kap. IV, §2, stk. 7 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, víkjast frá ásetingunum um mest loyvdu hædd, byggi- og nýtslustig og verða ásett, at gøtuhæddin bert kann nýtast til útvenda nýtslu..

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKiNUM

Stk. 1. Økið verður lagt til íbúðar- og miðstaðabygging.

Stk. 2. Niðasta hædd móti Tórsgøtu og Sverrisgøtu skal nýtast til útvent virksemi.

Stk. 3. Á matr. nr. 321, 322 og 323 skulu hæddirnar omanfyri tær, ið eru nevndar í §3, stk. 2 nýtast til íbúðarbygging.

Stk. 4. Á matr. nr. 327 skulu hæddirnar omanfyri tær, ið eru nevndar í §3, stk. 2 nýtast til íbúðar- og/ella miðstaðabygging.

Stk. 5. Byggistigið má ikki fara upp um 0,9.

Stk. 6. Nýtslustigið má ikki fara upp um 3,6. Viðv. parkeringskjallara, goymslurúmum, v.m. verður víst til skjal 1A.1.3, stk. 4. Pkt. 1 í Bygningskunngerðini 2017.

Stk. 7. Mest loyvdu hæddir verða máldar frá Tórsgøtu og Magnus Heinasonar gøtu.

Stk. 8. Mest loyvda hædd á bygging, ið er tættari matrikulmarki móti Tórsgøtu enn 3 m, er 13 m.

Stk. 9. Mest loyvda hædd á bygging, ið er tættari matrikulmarki móti Magnus Heinasonar gøtu enn 3 m, er 11 m.

Stk. 10. Afturat mest loyvdu hæddum, smb. §3, stk. 8 og 9, ber til at byggja eina hædd, ið ikki er hægri enn 3,5 m, og sum er min. 3 m frá matrikulmarki.

Stk. 11. Niðasta hædd móti Tórsgøtu og Sverrisgøtu, skal vera min. 1,5 m frá framsíðuni.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Til ber at skipa parkering undir jørð.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Tilfarsvalið skal vera býarkent.

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við býararkitketin.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk,

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna | | | | |
| **Undirheiti** | 1 | | | | |
| **Mát** | 1:500 | | | | |
| **Dagur** | 06.07.2022 | **Journal** | 21/00642 | **Tekna** | RVH |